



**Jens-Kjeld Jensen**
nolsoy@gmail.com
Heiðursdoktari á
Fróðskaparsetri Føroya



Mynd 1: *Lítlabøsandur, Nes, Hvalba*

# ÓSASEV

## – NÝSKRÁSETT PLANTA Í FØROYUM

Tað er ikki vanligt at finna nýggjar plantur í Føroyum. Síðan útgávuna av Føroyskari Floru fyri 20 árum síðani eru einans 3 sløg lýst: Loðin fjallatistil *Saussurea alpina*, tungutrøllakampur *Asplenium scolopendrium* og dúnhærdur fjallakampur *Oreopteris limbosperma* og nú hetta sevið, *Juncus alpinoarticulatus* subsp. *nodulosus*. Tað merkir, at vit finna eitt nýtt slag um leið fimtahvørt ár.



**Mynd 2:** *Ósasev*

18. august 2018 fóru Dánial Jespersen og eg, Jens-Kjeld Jensen, við Smyrli til Suðuroyar, har vit ætlaðu at leita eftir humlum og sævarplantum, t.d. strandarseyðaleyki *Triglochin maritima*, bognari stør *Carex maritima* og tráðmjáum havgrasi *Ruppia maritima*.

Fyrst gekk leiðin til Nes (Hvalba), og tað fyrsta, vit løgdu til merkis, var ein planta, ið stóð sum eitt teppi í vegjaðaranum. Talan var um eitt lítið sev upp í 30-35 cm hædd (mynd 1), sum var at finna í stórum tali í einum øki, sum var uml. 40 x 20 m.

Dánial visti beinanvegin, at hann ikki hevði sæð hetta sevið áður. Hvørgin okkara veit nógv um sev, men eg tók nakrar myndir og tók eisini fýra sev heim við.

Nakrar mánaðir seinni sat Marita Gulklett og skipaði nakrar myndir til heimasíðu okkara (www.jenskjeld.info), og tá spurdi hon: „hvørji eru hesi sevini, sum tú hevur tikið myndir av – tey eru ikki í bókini Føroysk Flora?". Einastu ráðini vóru at seta okkum í samband við plantufrøðingin Flemming Thorning-Lund, sum fleiri ferðir hevur verið í Føroyum sum ferðaleiðari.

Eg sendi tvey sev og nakrar myndir, og Flemming svaraði, at talan helst var um ósasev *Juncus alpino-articulatus* subsp. *nodulosus*, men hann vildi síggja nøkur sev, sum vóru hentað fyrr á árinum, um hann skuldi vera heilt vísur í greiningini av slagnum.

So á sumri 2019 vóru vit aftur á staðnum og hentaðu nøkur sev (mynd 2), og nú á heysti 2019 kom dagurin, tá Flemming var vísur í greiningini, og Føroyar høvdu fingið eitt nýtt slag.

## Eingin givið sær far um plantuna

Ósasev er helst ikki nøkur nýggj planta í Føroyum, men eingin hevur áður givið sær far um hana! Vit kenna nú 11 sløg av sevi (*Juncaceae*) í Føroyum. Ósasev vaksa m.a. í grannalondunum Íslandi og Stórabretlandi umframt í hinum Norðurlondum.

Her er vert at nevna, at trý tey seinastu nýggju føroysku sløgini øll eru funnin av somu trimum fólkum: Annleyg Patursson, Dánial Jespersen og Jens-Kjeld Jensen.

Nýggj sløg eru at finna bæði høgt og lágt. Dúnhærda fjallakampin funnu vit í nærum 700 metra hædd, og nú funnu vit ósasevið í hálvum metra hædd, so tað ræður um at hava eyguni opin, tá ferðast verður í náttúruni. Kvettið kann standa beint framman fyri einum.



**Mynd 3:** *Øki við ósasevi*



**Mynd 4:** *Ósasev. Suðuroy 3. august 2019*

## Keldur:

Johansen, J.,Fosaa, A.M. og Rasmussen S., ritstj. 2000. Føroysk Flora. Føroya Skúlabókagrunnur.

*Fosaa, A.M., Lawesson, J. E., Sykes, M. 1999. Saussurea alpina (L.) DC. Subsp. alpina (Asteracae)* - Alpina Saw-Wort: A New Record from the Faroe Islands. Fróðskaparrit 47. bók 1999: 153-157.

Jensen, J-K., Jespersen, D. & Patursson, A. 2008. Hjortetunge - en ny færøsk bregne. Urt 32 (1): pp. 22-23.

Jensen, J-K. 2013. Bjergbregne *Oreopteris limbosperma* en ny færøsk bregne. Urt 37 (4) pp. 152-153.

Mossberg, B. & Stenberg, L. 2007. Den Nye Nordiske Flora. Gyldendal: 1-928.